# Fundarbók hjá Eysturkommunu 520 Leirvík



**Býráðsfundur mánadagin 10. september 2015 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen

**Ikki á fundi:** Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 21.30**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| **1.** | **15/00249**<br>**Umsókn um marknaumskipan matr. nr. 89 í Leirvík**<br>Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um marknaumskipan av matr. nr.89 sum letur nakrar fermetrar til matr. nr. 91.<br><br>Tekniska umsiting mælir til at viðmæla umsóknini um marknaumskipan millum matr. 89 og 91.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at viðmæla umsókn um marknaumskipan millum matr. nr. 89 og 91 í Leirvík. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum byggi- og býarskipanarnevndini. |
| **2.** | **15/00083**<br>**Umsókn um byggiloyvi til tinihús á matr. nr. 195o á Hagaleiti í Leirvík**<br>Umsóknin frá Sp/f Konoy um at byggja eina tinihøll á Hagaleiti er avgreidd í Náttúrufriðingarnevdini og í Yvirfriðingarnevndini.<br><br>Tekniska umsiting mælir til at Sp/f Konoy fær byggiloyvi til Tinihúsið.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at geva byggiloyvi til tinihús á matr. nr. 195o á Hagaleiti í Leirvík.<br><br>Vinnunevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býraskipanarnevndini. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og vinnunevndini.<br><br>*Jóhan Christiansen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.* |

**Býráðsfundur mánadagin 10. september 2015 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen

**Ikki á fundi:** Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 21.30**

**3. 15/00176**

**Umsókn um útbygging av fjósi á matr. nr. 196e í Norðragøtu**

Festarin hevur sent umsókn við tekningum og frágreiðing um útbygging av fjósinum sum er í Norðragøtu. Málið er avgreitt hjá Heilsufrøðiligu Starvstovuni, Umhvørvisstovuni, Náttúrufriðingarnevdini fyri Eysturoyar Sýslu og Yvirfriðingarnevndini. Harumframt er málið sent til kunning hjá Landsverki, tí at bygningurin og køsturin er staðsettur meira enn 25 m frá vegmiðju á landsvegnum.

Tekniska umsiting mælir til at festari fær byggiloyvi til at útbyggja fjósið.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at byggiloyvi verður givið til útbygging av fjósinum sambært dagførdum prosjekti.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**4. 14/00400**

**Umsókn um byggiloyvi til timburhøll í Norðragøtu**

Í sambandi við at býráðið á býráðsfundi tann 25. mars 2015 hevur samtykt at selja BJ-Hammer betongsokkulin og økið har sum fyrr var bingjupláss í Norðragøtu (grótbrotið), hevur BJ–Hammer sent umsókn um byggiloyvi til timburhøll.

Tekniska umsiting mælir til at BJ-Hammer fær byggiloyvi til timburhøll, og at endaligur leigusáttmáli av økinum verður gjørdur.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at byggiloyvi verður givið til timburhøll í Norðragøtu (gamla bingjuplássið), men byggiloyvið verður ikki útskrivað fyrr enn byggimynduleikin

Vinnunevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini, vinnunevndini og fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 10. september 2015 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen

**Ikki á fundi:** Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 21.30**

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarkipanarnevndini og vinnunevndini.

**5. 15/00247**

**Umsókn um byggiloyvi til at víðka um verandi sethús á matr. nr. 319 í Leirvík – byggisamtyktin má broytast**
Í sambandi við umsókn um at víðka verandi sethús er neyðugt at broyta byggisamtyktina, ella ein part av byggisamtyktini.

Tekniska umsiting mælir til at broyta byggisamtyktina við altiti til verandi byggisamtykt ið ikki heimmilar at sethúsini verða útbygt.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at byggisamtyktin verður broytt frá Bakkavegnum til og við 194L. Talan er um matr nr. 316, 194a, 319 og 194L

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**6. 14/00359**

**Broyting við bygging av sethúsum ið krevur frávik til byggisamtyktina**
Í sambandi við ynski at gera kjallarahæddina nakrar fermetrar størri enn byggiloyvið og byggisamtykin heimmilar, verður málið um frávik lagt fyri til viðgerð.

Tekniska umsiting mælir frá at geva frávik og vísir til samtykt býráðsins dagf. 25. januar 2010 og galdandi byggisamtykt frá 13. august 2013.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at loyvið verður givið at stoypa garðin/veggin undir jørð.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

*Emma Rasmussen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

# Fundarbók hjá Eysturkommunu
# 520 Leirvík



**Býráðsfundur mánadagin 10. september 2015 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen

**Ikki á fundi:** Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 21.30**

**7. 15/00204**

**Góðkenning av ársroknskapi hjá Kongshavnar havn**

Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna fyriliggjandi roknskap.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________

Hanus Jacobsen ______________________

Hjalti Dalheim ______________________

Árni Jacobsen ______________________

Oluffa Joensen ______________________

Brandur Jacobsen ______________________

Emma Rasmussen ______________________

Ólavur Olsen ______________________